# Marknaavtalan merkist um eitt ár til tvey ár

**Týskvøldið 18. mai klokkan hálvgum átta sessast leiðandi politikarar úr Føroyum, Danmark og Bretlandi í nýumvaldu móttøkuhølunum úti í Tinganesi. Føroyska samtyktin av marknaavtaluni skal undirskrivast, og hesar undirskriftir eiga at hava við sær, at Føroyar longu um eitt ár fara at merkja, at fleiri pengar koma í ringrás í samfelagnum**

LEIF LAADAL

Tað kunnu ganga eini sjey til átta ár, áðrenn føroyski landskassin fer at merkja nakrar beinleiðis inntøkur av eini komandi oljuvinnu við Føroyar. Oljuskattur kemur ikki, fyrr enn olja og gass er funnið, og sjálv framleiðslan er byrjað.

Men Wilhelm Petersen, stjóri hjá Atlants Kolvetni, sigur, at føroyska samfelagið longu um eitt ár fer at merkja avleiðingarnar av marknasemjuni.

### Tríggjar samtyktir skulu til

Framferðarhátturin viðvíkjandi eini komandi føroyskari oljuvinnu - um alt gongur eftir ætlan - er hendan: Fyrst skulu allar undirskriftir um marknaavtaluna samlast inn. Í Føroyum sær ikki út til, at nøkur forðing er fyri, at avtalan kemur undir land. Allir flokkar á tingi taka undir við avtaluuni, so hátíðarløtan týskvøldið er ikki í vanda frá føroyskari síðu. Danski forsætisráðharrin Poul Nyrup hevur sagt, at danska stjórnin ikki fer at forða fyri nøkrum í avtaluni við bretar, og hann hevur tí heitt á teir partar í málinum, sum hava við donsku viðgerðina at gera, at málið verður avgreitt, áðrenn Fólkatingið fer í summarfrí. So eru bert bretar eftir. Teir hava eitt sindur øðrvísi framferðarhátt í tílíkum málum. Avtalan verður løgd í eina skuffu í undirhúsinum, og har liggur hon í ein mánað. Um eingin hevur funnist at henni og kravt víðari viðgerð, so er hon samtykt eftir hetta tíðarskeið.



**– Tað er í uppstartinum í oljuvinnuni, og serliga í útbyggingartíðarskeiðinum, um feløgini raka við olju, at økta virksemið í Føroyum fer at merkjast týðiligast, sigur Wilhelm Petersen, stjóri hjá Atlants Kolvetni**

Mynd: Kalmar

Fyrsta útbjóðingarumfar verður í heyst, siga bæði landsstýrismaðurin í oljumálum og forstjórin í oljumáladeildini. Tá ið umóknirnar eru viðgjørdar - væntandi um eitt ár - kunnu oljufeløgini fara at leita. Frá tí at tey byrjað at leita, kann so ganga upp til átta ár, áðrenn eitt oljufelt stendur liðugt og klárt til at pumpa upp olju ella gass.

### Um eitt ár

Føroyingar noyðast tó ikki at bíða í átta ár, áðrenn teir koma at merkja ávirkanina av eini komandi oljuvinnu. Longu tá ið leitingin byrjar um eitt ár, vilja summi økir í Føroyum uppliva ein størri eftirspurning.

Wilhelm Petersen frá Atlants Kolvetni metir, at størsti aktiviteturin í sambandi við eina komandi føroyska oljuvinnu í Føroyum júst verður áðrenn sjálv oljuframleiðslan byrjar.

– Tá ið oljupallar og virkir eru útbygd, er ikki so nógv eftir hjá føroyingum at gera, annað enn kanska at arbeiða umborð á pallunum, men væntandi verða fleiri útbjóðingarumfør og hetta hevur við sær, at leiti- og útbyggingarvirksemi verður støðugt í nógv ár fram í tíðina, sigur Wilhelm Petersen.

Í leititíðarskeiðinum fara fyrireikingarnar at hava við sær, at økt virksemi millum annað verður innan allan flutning. Eisini verður øktur eftirspurningur hjá gistingarhúsum, matstovum, skipasmiðum, oljusølum og øðrum.

Um oljufeløgini raka við olju, so verður eisini ein rættiliga stórur aktivitetur í útbyggingartíðarskeiðnum, men ikki fyrr enn hetta er liðugt, koma pengar av oljuskatti beinleiðis í landskassan.

Føroyingar skulu sostatt ikki rokna við, at oljumilliónirnar koma størleypandi beinanvegin, men ávirkanin fer at merkjast á nøkrum økjum beinanvegin.

Wilhelm Petersen metir, at eitt fult útbygt oljuøki við Føroyar stendur liðugt um eini sjey-átta ár, um man rakar við olju, og talan er um passandi nøgdir.


**Konsert við Musica Viva**

**sunnudagin 16/5-99 kl. 16.00 í Norðurlandahúsinum**

Luttakarar: Jóhannes Andreasen, klaver
Stamen Stantchev, klaver
Sámal Petersen, violin
Nikolaos Kapnas, bratsj
Páll Danielsen, upplestur

**Skrá:**

William Heinesen: (1900-1991) »Vågn op og slå på dine strenge« Variatiónir yvir gamalt føroyskt sálmalag fyri solobratsj.

Sergei Rachmaninov: (1873-1943) Preludium ciss-moll, op. 3 nr. 2
Preludium g-moll, op. 23 nr. 5
fyri soloklaver

Fritz Kreisler: (1875-1962) Recitativo e Scherzo, op. 6
fyri soloviolin

Frederic Chopin: (1810-1849) Nocturne ciss-moll, op. posth.
Scherzo nr. 2 b-moll, op. 31
fyri soloklaver.

Steðgur

Wolfgang A. Mozart: (1756-1791) Duo G-dur, KV 423
fyri violin og bratsj
1. Allegro
2. Adagio
3. Rondeau. Allegro

Johannes Brahms: (1833-1897) Ungarskir dansir nr. 8 og 5
fyri ferhent klaver.

Atgongumerki á 80 kr. fáast í Norðurlandahúsinum, børn og pensiónistar gjalda 1/2 pris.


# – Landsstýrið er lopið framav við marknaavtaluni

**Edmund Joensen, fyrrverandi løgmaður, heldur, at landsstýrið átti at fingið munandi meiri burturúr avtaluni við bretar um markið. Hann metir, at úrslitið hevði verið fleiri ferðir betri, um málið varð loyst á hægsta politiska støði**

LEIF LAADAL

Um teir avgerandi marknafundirnir millum bretar og føroyingar vórðu hildnir av landsins ovasta politisku myndugleikum, ella um málið hevðir verið drigið eitt sindur longur út, so høvdu Føroyar óivað fingið ein størri part av tí gráa økinum, sum liggur millum Føroyar og Skotland. Hetta heldur formaðurin í Sambandsflokkinum, Edmund Joensen.

Av misgávum skrivaðu vit her í blaðnum í gjár, at Edmund Joensen metti, at Føroyar høvdu havt fyrimun, um marknatrætan endaði við altjóða dómstólin í Haag. Hetta er ikki rætt. Tað, sum Edmund segði, var, at málið hevði verið til føroyskan fyrimun, um tað var avgjørt á hægsta politika støði.

Formaður Sambandsfloksins fílist á, at tað ikki vóru Tony Blair, bretski forsetisráðharrin og Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum fingu avtaluna endaliga uppá pláss.

### Mist tað besta

Edmund Joensen sigur, at tað, sum vanliga verður rópt gráa økið millum Føroyar og Skotland, kanska er tað mest áhugaverda øki, tá ið hugsað verður um tilfeingið úr undirgrundini.

– Serfrøðingar meta, at tað júst er her, at størst kjansur er fyri at raka olju og gass, og tí er tað harmiligt, at føroyingar ikki hava nøkur rættindi til undirgrundina í hesum øki, sigur Edmund Joensen.

Formaðurin í Sambandsflokkinum ivast ikki í, at Føroyar høvdu fingið eina enn betri avtalu, um vit høvdu bíðað eitt sindur við at skriva undir.

– Trýst var á bretar, so at skilja, at stóru oljufeløgini, sum hava áhuga í bretska økinum, høvdu gjørt bretsku stjórnuni greitt, at ein loysn mátti finnast, og tí hevði tað verið skilagott at bíða við at gjørt eina avtalu, til bretar vóru meiri moyrir, sigur Edmund Joensen.



**Um teir avgerandi marknafundirnir millum bretar og føroyingar vóru hildnir av landsins ovasta politisku myndugleikum, høvdu vit fingið meiri burturúr, heldur Edmund Joensen**

Edmund Joensen viðgongur tó, at eingin vegur er aftur. Borðið fangar, og tann avtalan, sum nú er komin undir land, verður útgangsstøði fyri øllum tí, sum hendir víðari við olju, gassi og fiski.

Edmund ivast ikki í, at samráðingarnevndin hevur gjørt eitt dugdar arbeiði, men hann minnir á, at ein stórur partur av arbeiðinum var gjørt, áðrenn Anfinn Kallsberg tók yvir landsins leiðslu.

– Eg meti, at 96 % av avtaluni var komin undir land fyri einum ári síðani, sigur Edmund Joensen.

# Samd nevnd tekur undir við løgmanni

**Uttanlandsnevndin hevur ikki stórvegis trupulleikar at geva grønt ljós fyri, at marknatrætan millum Føroyar og Bretland fær tann enda, sum løgmaður hevur skotið upp**

INGI RASMUSSEN

Ein samd uttanlandsnevnd hjá løgtinginum tekur undir við uppskotinum hjá løgmanni til áseting av undirgrundarmarkinum millum Føroyar og Bretland.

Hetta gongur fram av álitinum, sum var lagt fyri tingið fríggjadagin.

Við hesum verður greiða ábendingin frá fyrstu viðgerðini í løgtinginum váttað, at tað verður eitt einmælt løgting, sum setir fingurin á grøna ja-knøttin.

Síðani málið um áseting av markinum byrjaði, hevur uttanlandsnevndin fingið frágreiðingar um gongdina í málinum og er javnan tikið við upp á ráð – seinast, tá sjálvt sáttmálauppskotið var lagt fram.

Nevndin hevur soleiðis longu áðrenn sáttmálin var lagdur fyri tingið boðað løgmanni frá, at hon tekur undir við honum.

Kortini gongur sæst eisini av álitinum, at nevndin ikki hevur verið samd áleiðis. Hetta kom eisini fram, tá málið var til fyrstu viðgerðar. Edmund Joensen og Jenis av Rana hava ført fram, at ikki er neyðugt at bera so skjótt at.

Formaður Sambandsfloksins vísir soleiðis á, at føroyingar kundu fingið ein munandi størri part av tí sonevnda gráa økinum, um samráðingarnar vórðu havdar á hægsta politiska stigi.

Væntandi verður sáttmálin millum Bretland øðrumegin og Føroyar og Danmark hinumegin undirskrivaður í Føroyum komandi týsdag, eftir at løgtingið hevur samtykt hann mánadagin.

Roknað verður við, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, skrivar undir vegna Føroyar, danski uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen vegna Danmark og bretski varauttanríkisráðharrin Tony Lloyd vegna Bretland.

Sáttmálin verður væntandi lagdur fyri Fólkatingið dagin eftir, hann er undirskrivaður. Lagt verður í somu atløgu Fólkatinginum eina við, at sáttmálin skal vera liðugt viðgjørdur, áðrenn tað fer í summarfrí grundlógardagin, 5. juni.

Í Bretlandi er mannagongdin hon, at stjórnin kunnar parlamentið um sáttmálan. Hevur parlamentið ikki biðið um at fáa sáttmálan til viðgerðar innan 30 dagar, verður hann roknaður sum góðkendur.

Bretska parlamentið fer ikki í summarfrí fyrr enn síðst í august mánaði.

## Forðaður at fara í bát

RANDI JACOBSEN

Mikudagin seinnapartin ætlaði ein 25 ára gamal maður sær at fara við opnum báti úr Havn norður í Sundalagið. Men har var onkur, sum helt mannin ikki vera føran fyri at fara við báti og boðaði politinum frá.

So var, blóðroyndin hjá politinum vísti, at maðurin hevði stiva kenning. Promillan var upp ímóti 3.


